

*So illa hevur politiski myndugleiki okkara stýrt, at umsitingin av samfelagnum kostar fleiri hundraðtals milliónir meira, enn fyri bert fáum árum síðan. Gulltíðin er kortini ikki komin okkara sjúku, teimum eldru og veiku ella sjúkrahúsverkinum til góðar, sigur Ingeborg Vinther m.a. í formansfrágreiðing síni*

# Gulltíðin ikki komin øllum til góðar

**Forkvinnan í Føroya Abeiðarafelag, Ingeborg Vinther, segði m.a. í formansfrágreiðing síni á aðalfundi felagsins um vikuskiftið, at hóast vit hava havt góðar tíðir, gulltíð nevnd, og búskaparliga framgongd, so er hetta ikki komið øllum til góðar, men almenna umsitingin bólgnar og kostar í dag meira, enn nakrantíð**

FAKFELØG
*Dagfinn Olsen*

Føroya Arbeiðarafelag hevði aðalfund um vikuskiftið og formansfrágreiðingin er áhugaverdur lesnaður. Har verður komið inn á ymisk viðurskifti, m.a. verkfallið, og Ingeborg Vinther, forkvinna, metir í frágreiðingini m.a. um farna árið og farna valskeið. Og tað eru ikki bert blíð orð, ið landsins myndugleikar fáa.

Hóast framgongd í samfelagnum, so hava tey lægstløntu ikki merkt so nógv til hetta. Og Ingeborg Vinther sigur soleiðis um samráðingarnar seinast og verkfallið:

- Har var so vónleyst at fáa eina lønarhækking, ið var sámilig, og anciennitetsskipan fyri tey, ið hava verið fleiri ár á sama arbeiðsplássi. Hetta kundi als ikki fremjast og endaði eisini við verkfalli.

Ingeborg Vinther takkaði limunum fyri gott samstarv og fyri samanhald undir verkfallinum og hon minti á, at eitt fakfelag er ikki sterkari, enn limirnir gera tað, og stuðla teir ikki, gerst felagið ov veikt.

### Gulltíð

Ingeborg Vinther fýlist á, at búskaparliga framgongdin seinnu árini ikki er komin teimum sjúku, teimum eldru og veiku ella sjúkrahúsverkinum til góðar. Og pláss hevur ikki verið fyri sámuligari lønarhækking til tey lægstløntu, hóast tosað hevur verið um gulltíðina.

Mett verður í frágreiðingini, at illa hevur politiski myndugleikin stýrt. Almenna umsitingin kostar sera nógv at reka í dag, og tungt verður at gjalda rokningina, tá rákið vendur og gulltíðin er av.

- Í eini tíð,har tað hevur gingið so væl búskaparliga, at tosað hevur verið um gulltíðina í samfelagnum, - fiskaprísirnir hava verið uppi ígjøgnum, alt hevur gingið sera væl,virkini hava havt stórt yvirskot, og landskassin er á tremur, - hevur ikki verið pláss fyri einari sámiligari lønarhækking til tey lægstløntu. Heldur ikki vóru ráð til eina væl betri eftirløn fyri tey eldru. Tá vóru hvørki ráðini ella vilji til tess.Hetta er so vælferðarsamfelagið Føroyar í dag. Tann almenna umsitingin er bólgnað upp. Lýsingar eru eftir fólki, hvørja ferð dagbløðini koma út. Hvat henda umsiting og øll aðalstýri, ið Landsstýrið er býtt upp í, kostar skattaborgarunum, duga fólk illa at ímynda sær, men eitt er heilt greitt: Tann almenna umsitingin kostar alt meira.

Tann dag, tíðirnar ikki vera so góðar, sum nú, verður strævið at gjalda rokningina. Ógvuliga lítið skal til í einum samfelag sum okkara, at tað góða rákið vendir. Bert fiskurin minkar og prísurin fyri útflutning av fiski verður lægri, er vandi á ferð, tí vit hava einki annað uttan fiskin at dúva uppá, tað veri seg rávøran,sum skipini føra í land,ella tað, ið alibrúkini framleiða. So illa hevur politiski myndugleiki okkara stýrt, at umsitingin av samfelagnum kostar fleiri hundraðtals milliónir meira, enn fyri bert fáum árum síðan. Gulltíðin er kortini ikki komin okkara sjúku, teimum eldru og veiku ella sjúkrahúsverkinum til góðar, sigur Ingeborg Vinther m.a. í formansfrágreiðing síni.

### Innflyta arbeiðsmegi

Tosið um at flyta inn arbeiðsmegi til Føroya verður eisini havt á lofti í formansfrágreiðingini.

Og Ingeborg Vinther mælir til at vísa hógv hesum viðvíkjandi, meðan vit enn hava arbeiðsleysar føroyingar í landinum.

- Eitt hitt seinasta bragdið frá Vinnumálastýrinum er at lata útlendingar koma inn í landið at arbeiða, uttan at fakfeløgini, har hesir útlendingar skulu vera limir í, verða eftirspurd, hetta, hóast vit hava meira enn 500 arbeiðsleys, sigur Ingeborg Vinther m.a. í frágreiðingi.

Forkvinnan í FA metir, at tá uppiløgudagar verða í fiskivinnuni, ella arbeiðið minkar av onkrari orsøk, so verða limirnir í FA ikki teir fyrstu til arbeiðis. Hon ávarar tí ímóti at flyta inn arbeiðsmegi og metir, at fakfeløgini eiga at hava eitt orð at siga hesum viðvíkjandi.

Víst verður til, at tørvur neyvan er á at flyta inn arbeiðsmegi, tí ikki allastaðni er so nógv virksemi, og yvir 500 eru arbeiðsleys í Føroyum í dag.



# Alt ov fá kør og fiskakassar í landinum

**Fiskamarknaður Føroya noyðist at siga skip frá sær, tí marknaðurin hevur ov fáa kør og kassar til fiskin, sum kemur inn á gólvið og skip, sum hava landað, sleppa stundum ikki útaftur beinanvegin, tí ov fáir kassar eru at koyra umborð. Virkir leggja inn undir seg, og tað ger, at trupulleikin gerst uppaftur størri.**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Ov fá kør og kassar á landi og umborð á skipum og bátum er ein stórur trupulleiki, sum lítið hevur verið at hoyrt um. Tískil veit fáur, hvussu stórur hesin trupulleiki í veruleikanum er. Men fyri tey, sum virka í vinnuni, er tørvurin á kørum og kassum ein sonn marra.

Fiskamarknaður Føroya er ein landingarmiðstøð, men tað eru dagar, har marknaðurin ikki torir at landa skip, tí ivamál er, um nóg mikið er av kørum og kassum at koyra fiskin í, sum kemur inn á gólvið. Tað er hent meira enn einaferð, at Fiskamarknaðurin hevur verið noyddur at siga skip og bátar frá sær, og tað er eisini hent, at skip hava ligið og bíðað í dagar eftir kørum, so fiskurin kann takast upp úr skipinum og koyrast inn á gólvið.

Nøkur skip hava eisini leysan fisk, serliga línubátarnir, og tað ger ikki trupulleikan minni.

### Bátar noyðast at bíða

Á Fiskamarknaðinum siga tey, at trupulleikin við kørum er nógv størri enn við kassum, tí eitt nú partrolararnir brúka smá kør til fiskin.

Øll skip og virkir eru við í eini kassaskipan, har Kassamiðstøðin skal syrgja fyri, at nóg mikið av kørum og kassum eru í landinum. Keyparin og seljarin av fiskinum rinda eitt ávíst avgjald til Kassamiðstøðina.

– Vit hava ein stóran trupulleika til dagligt, tí vit umsita so nógvan fisk, og trupulleikin er uppaftur størri, nú so nógvir bátar eru á Norðhavinum, siga tey á Fiskamarknaðinum.

Tey vísa á, at ein dagin herfyri lógu fleiri útróðrarbátar og bíðaðu eftir at sleppa av við fiskin, tí eingin kør vóru at koyra útróðrarfiskin í.

– Bátarnir noyddust at bíða, til kør vóru tøk inni á gólvinum, og vit høvdu eingi kør at taka fiskin uppí. So, hetta er ein ógvuliga torfør støða hjá okkum, siga tey á Fiskamarknaðinum.

### Gomlu kørini burtur

Endamálið við Kassamiðstøðini er, at virkir og skip skulu hava eins kør. Fýra støddir eru av kørum; 300, 380, 460 og 660 litrar, og kassarnir eru ávikavist 75 og 90 litrar.

– Roynt hevur verið at fingið tey gomlu kørini og teir gomlu kassarnar úr skipanini. Her vóru fleiri ymiskt sløg, og høvdu kør og kassar fingið stoyt, og rivur vóru komnar í, vigaðu tey ymisk, tí vatn settist til. Tí varð ofta neyðugt at viga kørini, áðrenn fiskur kundi stoytast í.

Á Fiskamarknaðinum siga tey, at tey nýggju kørini eru meira gummi-kend og brotna ikki so lætt sum tey gomlu. Vatn sleppur heldur ikki ímillum, og tí broytistvektin ikki.

Skipanin er hon, at tann, sum keypir fiskin, rindar eisini fyri kør og kassar, men tá ið tú kemur aftur við hesum, fært tú eina mótrokning, sum tey kalla tað. Aftrat hesum er so eisini eitt kassagjald, sum fer til Kassamiðstøðina, og tað gjalda bæði seljari og keypari.



*– Vit hava ein stóran trupulleika til dagligt, tí vit umsita so nógvan fisk, og trupulleikin er uppaftur størri, nú so nógvir bátar eru á Norðhavinum, siga tey á Fiskamarknaðinum.*

Fiskavirking á Tvøroyri:

# Arbeiða upsa, kongafisk og svartkalva

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Síðan tey byrjaðu aftur at arbeiða á Fiskavirking á Tvøroyri eftir nýggjár, hevur eingin steðgur verið í arbeiðinum. Gólvini hava ikki verið turr, og fólk hava havt nóg mikið at tikist við hvønn einasta arbeiðsdag.

Mánadagin keypti virkið á Tvøroyri 80.000 pund av upsa frá Roc Amadour, sum landaði í Vági.

Nakað av fiski lá niðurfyri frá vikuni undan hesari, og týsdagin hevði Fiskavirking á Tvøroyri 200.000 pund av fiski inni.

### Anita og Hoyvíkingur

Bjarni Hansen, virkisleiðari, sigur, at tey vænta garnabátin, Anitu, inn í vikuni, men hann visti ikki at siga, hvussu nógv teir hava inni.

- Vit skulu eisini landa Hoyvíking í dag. Teir høvdu 600 kassar inni mánadagin, sigur virkisleiðarin.

Týsdagin var tó ikki greitt, hvør keypir fiskin hjá Hoyvíkingi.



*Tað hevur ongantíð verið turt gólv á Fiskavrking á Tvøroyri, síðan gongd kom á aftur tíðliga í hesum árinum. Mánadagin arbeiddu tey fisk frá Roc Amadour, sum landaði í Vági í síðstu viku*

*Mynd: Dagfinn Olsen*

# Trol-og línufiskur í Miðvági

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Tveir trolarar og ein línubátur høvdu landað í Miðvági, tá vit frættu higani fyrr í vikuni.

Vesturtúgvan var á Miðvági týsdagin við 100.000 pundum, og djúpvatnstrolarin, Vesturskin, var somuleiðis inni við 100.000 pundum. Meginparturin av veiðini hjá Vesturtúgvini var upsi, og Vesturskin hevði kongafisk og upsa.

Mikudagin kom línuskipið, Eysturoyingur, inn at landa. Teir hava 70.000 pund tilsamans, harav 40.000-50.000 pund er hýsa, sum Fiskavirking í Miðvági keypir. Restin av fiskinum fer til onnur virki.

Albert Ellefsen, virkisleiðari, sigur, at allur fiskurin hjá Vesturtúgvuni og Vesturskin eisini fór til onnur virki, so hesum fekk Fiskavirking í Miðvági heldur einki burtur úr.

– Men vit hava nóg mikið at gera sum er, sigur virkisleiðarin.




*Vesturtúgvan var á Miðvági týsdagin við 100.000 pundum*

HYGG HER

Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo

Brúktir bilar til sølu

Citroen Xantia 1,9 TD 5H
km. 94.000, árg. okt. 1996
115.000,-

Citroen Xantia II 2,0 HDi 5H
km. 75.000, árg. aug. 1999
162.000,-

Citroen Xantia II 2,0 HDi stc. 5H
km. 52.500, árg. nov. 1999
172.000,-

Citroen Xantia Exclusive 3,0 V6
km. 62.500, árg. juni 1998
165.000,-

Citroen Xsara 2,0 HDi stc. 5H
km. 83.000, árg. juni 1999
140.000,-

Citroen Xsara 2,0 HDi 5H
km. 60.000, árg. aug. 1999
158.000,-

Citroen ZX 1,4i 5H
km. 70.000, árg. feb. 1996
75.000,-

Mitsubishi Colt 1,3 GLXi 3H
km. 230.000, árg. jan. 1989
15.000,-

Mitsubishi L300 2,5D
km. 161.000, árg. juni 1994
80.000,-

Ford Escort 1,8D CLX 4H
km. 187.000, árg. nov. 1995
Sýnaður 06'01 45.000,-

Ford Escort 1,8i 16V 5H
km. 80.000, árg. juli 1996
70.000,-

Hyundai Accent 1,3 LS 5H
km. 65.000, árg. feb. 1999
75.000,-

Peugeot 306 D 4H
km. 150.000, árg. apr. 1995
80.000,-

Seat Cordoba 1,9 SDi STC. 5H
km. 35.500, árg. aug. 1999
115.000,-

VW LT31 vøruvognur 2,4D
km. 148.000, árg. okt. 1993
49.000,-

Møguleiki er eisini at royna nýggjar bilar

Vælkomin til
Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo

Sosialurin - 311820